TRIV SP/F

# Søkir eftir fólki til verkstaðin

**Arbeiðið umfatar:**
Umvæling av landbúnaðarmaskinum, so sum traktorar, sláimaskinur, ballupressur o.l.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur viðkomandi útbúgving s.s. maskinmeistari, maskinsmiður ella bilmek. Hetta er tó eingin treyt, tí hevur tú áhuga í og kunnleika til motorar og maskinur, hava vit eisini brúk fyri tær.

Um tú heldur, at hetta er nakað fyri teg ella hevur tú spurningar til starvið, er tú vælkomin at seta teg í samband við okkum ella senda okkum, innan eina viku, eina umsókn við møguligum prógvum og viðmælum.

**Triv** er ein 22 ára gomul fyritøka, sum selur flestu merkir av landbúnaðarmaskinum

Triv

Heygsvegur 30
P.O. Boks 197
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 69 10
Fax 31 81 19

Sosialurin
www.sosialurin.fo

SEV

# Skrivstovufólk
## søkist til Elfelagið SEV

**Eitt starv sum skrivstovufólk á skrivstovuni hjá SEV í Havn er leyst at søkja.**

**Starvið:**
Arbeiðstíðin er mánadag til hósdag kl. 1000 til 1615 og fríggjadag kl. 1000 til 1515. Mattíðin er 30 min. um dagin, men kann longd mattíð avtalast móti at møta fyrr á degi.

Starvið umfatar fyrst og fremst at passa telefonvekslaraskipan okkara, men skal viðkomandi rokna við eisini at skula røkja aðrar uppgávur, ið hoyra skrivstovuni til.

**Førleikakrøv:**
Starvið krevur ikki nakra formliga yrkisútbúgving, men við tað, at SEV hevur í ávísan mun samskifti við útheimin, er neyðugt at kunna samskifta á skandinaviskum og enskum.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og Starvsmannafelagið alt eftir útbúgving og starvsroyndum. Starvið er roknað til umleið 79% av fulltíðarstarvið, og verður lønin sett eftir hesum.

**Upplýsingar um starvið:**
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til John P. Danielsen, deildarstjóra á tlf. 346800.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við møguligum prógvum og ummælum skulu sendast Elfelagnum SEV, Box 319, 110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi mikudagin, tann 27. juni 2007.

SKÁLA SKÚLI

Skálavegur 194 · FO-480 Skála
Tlf. 441368 · Fax 441360
skalask@post.olivant.fo
www.skulin.fo/ska

# Lærarastørv og starv sum stuðul í Skála skúla

**Hesi størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2007:**
- 2 tíðaravmarkað størv, fulla tíð, vegna avlopstímar, lækkað tímatal, serligan tørv
- 1 tíðaravmarkað starv, uml. fulla tíð, vegna serligan tørv. Endaliga tímatalið verður ásett eftir 1. sept.
- 1 starv sum stuðulsfólk 10 tímar um vikuna til næming við serligum tørvi.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarv við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- eru við til áhaldandi at menna skúlan

**Harafturat skulu lærararnir hava førleika at átaka sær:**
- undirvísa gentum og dreingjum í ítrótti og svimjing.
- undirvísa í náttúru/tøkni og alis-/evnafrøði
- undirvísa í tónleiki og evning
- annars átaka sær undirvísing í øðrum lærugreinum.
- flokslærarauppgávuna

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving og helst linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

**Lønar- og setanartreytir**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, ið settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

Starvið sum stuðul verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera fyrstalæraranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 25. juni kl. 16.00.

Meira kann fáast at vita um størvini frá fyrstalæraranum Hans Jákup Andreasen á tlf. 442118 ella 586005.

# Felagsskúlin á Oyrarbakka

lærarastørv

**Søkt verður eftir lærarum**
- 4 føst fulltíðarstørv. Størvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, ið settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.
- 1 tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/08 vegna avlopstímar. Starvið er umleið 10 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður fastsett eftir 1. september.
- 1 styttri tíðaravmarkað starv fyri lærara, ið er í farloyvi.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- vilja taka við teimum broytingum, ið flyta skúlan til at taka ímóti teimum avbjóðingum samfelagið setir næminginum

**Hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum/lærugreinaøkjum:**
- undirvísa í føroyskum og donskum
- undirvísa í enskum og týskum
- undirvísa í alis- og evnafrøði, landalæru og lívfrøði
- undirvísa í rokning og støddfrøði
- undirvísa í tilevning
- undirvísa í træ- og jarnsmíð
- undirvísa í ítrótti og svimjing
- vera flokslærarar

**Førleikakrøv**

Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum.
Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum og hava hollan kunnleika til teldur sum amboð/miðil í frálæruni.
Tó kunnu lærarlesandi, ið lúka prógv í summar, eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir**

Setanarøkið er Felagsskúlin á Oyrarbakka. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.
Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.
Tey føstu størvini verður sett frá 1. august 2007, tað eina tíðaravmarkaða starvið fyri skúlaárið 2007/08 og tað styttra tíðaravmarkaða frá 1. august til 31. desember 2007.

**Umsóknir**

Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. juni 2007, kl. 12.00.

Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til skúlastjóran tlf. 212084.

# Kassafólk

Søkt verður eftir fólki at passa kassan og fylla vørur upp fyrrapartar og seinnapartar, aðruhvørja viku og annanhvønn leygardag, at byrja beinanvegin ella smb. avtalu.

*Keypmaðurin "úti í Grønlandi"*
*JOHANNES ANDREASEN*
Pf. Johannes Andreasen · Grønlandsvegur 16
Tel. 31 20 87 · ja@post.olivant.fo